# The Rasmus eru umbidnir allastaðni

**Rockbólkurin The Rasmus, sum verður við á Summar Festivalinum í ár, hevur úr at gera við at spæla á stórum konsertum og festivalum kring allan heimin. Bólkurin er í stórformi, nú teir skjótt seta kós ímóti Føroyum**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Tað er ikki ein smávegis konsertferð, sum The Rasmus eru á í løtuni. Bólkurin, sum fekk gjøgnumbrot kring alt Europa og víðahvar í heiminum við sanginum In The Shadows, hevur í ár spælt í fleiri heimspørtum, og nógvar spennandi uppgávur bíða eftir bólkinum.

Tað hevur rættiliga gravgangur eftir at fáa The Ramus at spæla til konsertir og festivalar, og hetta sæst eisini aftur á teirra umfatandi konsertskrá, sum eisini førir teir Føroyar fyrsta vikuskiftið í august.

### Ferðast víðahvar

Tað var seint í fjør, at The Rasmus byrjaði drúgvu konsertferðina á heimavølli í Helsinki. Síðani gekk leiðin til europeisk lond sum Týskland, Ongland, Luxemburg, Holland, Spania, Portugal, Ungarn, Kekkia og fleiri onnur lond. Síðani hevur The Rasmus eisini spælt í londum sum India, Suðurafrika, Chile, Japan, Argentina, Mexico og Kolumbia.

Í løtuni er bólkurin staddur í Ukraine, har teir skulu hava fleiri framførslur, og seinni í summar verða framførslur á festivalum í Noregi, Finnlandi, Fraklandi, Belgia, Slovakia og ikki minst í Føroyum.

### Nýtt hitt í Føroyum og aðrastaðni

The Rasmus er ein framúr góður livebólkur, sum eisini er sera væl samanspældur. Limirnir í bólkinum hava spælt saman síðani ungdómsárini, og tað sigst, at bólkurin hevur ongantíð verið so góður, sum hann er júst nú.

Seinasta hittið hjá The Rasmus er framúr vakra balladan Sail Away, sum eisini stendur seg væl á 15 teimum bestu. Sangurin hevur verið í 9 vikur inni á 15 teimum bestu og liggur hesa vikuna sum nummar 5.


*The Rasmus fara at spæla á Summar Festivalinum í Klaksvík fríggjakvøldið 4. august*





**Hetland**

Galdandi frá 23/06 - 27/10-06



**Flúgv og búgv í Hetlandi**
3 nætur á The Shetland Hotel

Fríggjamorgun - mánakvøld

Prísur fyri hvønn í dupultkamari. Eyka fyri einakamar kr. 962,-. Íroknað prísin er flogferð, gisting, morgunmatur og øll avgjøld

**3.608,-**



**Flúgv og koyr**
B-bilur í 4 dagar

Fríggjamorgun - mánakvøld

Prísur fyri 2 fólk og bil. Íroknað prísin er flogferð fyri 2 fólk, bilaleiga og øll avgjøld

**5.644,-**



**Flúgv til Hetlands**
Bara flogferð

Íroknað prísin eru øll avgjøld.
(Bílagt á atlantic.fo)

Prísur úr: **1.867,-**

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.atlantic.fo





Málsviðgeri
til Almannastovuna

Á Tænastudeildini starvast 2½ málsviðgerar og ein deildarleiðari. Høvuðsuppgávurnar hjá deildini eru at taka telefon, taka ímóti viðskiftafólki, skráseta allan innkomnan post o.a.

Hevur tú hug at royna teg í einum arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning, so er eitt fulltíðarstarv sum málsviðgeri á Tænastudeildini leyst at seta skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Anne Djurhuus, deildarleiðara, á tlf. 35 35 10 ella við at fara inn á heimasíðu okkara www.almannastovan.fo ella www.portal.fo.

Umsóknarfreistiner 5. juli 2006 kl. 12.00.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80





Sosialráðgevar
til Eysturoyar deild

Á Almannastovuni arbeiða umleið 100 fólk, harav 6 starvast á økisdeildini í Eysturoy.

Hevur tú hug at royna teg í einum fjølbroyttum, avbjóðandi starvi í einum arbeiðsumhvørvi, sum er í støðugari menning? So er hetta nakað fyri teg. Tvey fulltíðarstørv sum sosialráðgevi eru leys at søkja á økisdeildini í Eysturoy. Arbeiðsøkið verður partvís á deildini í Runavík og partvís á deildini í Klaksvík.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Egil G. Olsen, deildarleiðara, á tlf. 474710, ella við at fara inn á heimasíðu okkara www.almannastovan.fo ella www.portal.fo.

Umsóknarfreistin er 5. juli 2006 kl. 12.00.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80